# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

***Dalur:*** kl. 12, Bjarni Bæk
***Skopun:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Hvalba:*** kl.12.30 Familjugudstænasta Símun Jacobsen
***Talvan gongur fyri kirkjuligu heimamissiónina.***
***Leiti: kl. 12,***
***Eldrabýlið í Vági:*** kl. 14, Patrick de Neergaard
***Tvøroyri:*** kl. 11, altargongd, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Heimamissiónina

***1. sunnudag í føstu gongur talvan fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Porkeris kirkju.***

**Kvívíkar kirkja**
Leygarkvøldið kl. 19 hevur Kristine S. Hestbech fyrilestur í Kvívíkar kirkju um »Det gode liv«. Eisini syngur Nicolina av Kamarinum.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti: Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.00
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Einki møti hóskvøldið og sunnukvøldið.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20 Húsbólkar. Einki møti í Hebron.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka.
Kl. 12: Sunnudagsskúli og møti. Á møtinum talar Páll Poulsen.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Anniku við Skipá, (sjónvarpsupptøka)
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Onki ungdómsmøti fríggjakvøldið.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti har Absalon Áargarð talar.
kl. 11.30 er Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Jógvan talar um »Frá steinhjarta til kjøthjarta« 6. partur,
kl. 12 Sunnudagsskúli. Barnaansing er undir báðum møtinum fyri børn undir skúlaaldur.
Møtini hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið kl. 20 á Brekku møti, har Jógvan undirvísir um »Andaligu gávurnar og tænastan í samkomuni«.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Bíbliugransking verður mikukvøldið kl. 20, evnið: Elias.

**Adventkirkjan**
Mikukvøldið hevur Jens V. Danielsen fyrilestur um Dánielsbók.

**Katólska Kirkjan**
***Øskudagur:*** Orðsins tænastan við kommunión verður í Mariukirkjuni mikukvøldið 6. februar kl. 19.30.
Hóskvøldið 7. feb. kl. 20 verður Taizé-kvøld í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Fríggjadag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wienczslaw Barwinski, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli. www.katolsk.fo

**Missiónsvika á Argjum**
Mikudagur kl. 19.30 Møti við Regin Høgnesen, trúboðara. Rannvá, Jútta og Jens Michael syngja.
Hósdagur kl. 19.30 Møti við Sverra Steinhólm, presti. Manskórið í Fuglafirði syngur

**Ebenezer**
Mikudag kl. 17.15 Sangvenjing - Kassia
kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti
Hósdag kl. 17 Sangvenjing – Barnakórið – Gentir og dreingir 7-9 ár,
kl. 20 Ungdómsmøti – Talari: Jens Olsen.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikudagin kl. 17.30 guitarfrálæra. Einki ungdómsmøti fríggjakvøldið vegna ungdómsmøti í Oasuni hóskvøldið.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 Bøn fyri Býnum og Ísrael,
kl. 18.00 Delli (3. til 6. fl.)
kl. 20.00 Chill (7. til 10. fl.)
Hóskvøldið kl. 20 Felags Ungdómsmøti í Oasuni - einki Flare verður leygardagin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15 Bønarløta í salinum.
Hósdag kl. 20 Heimaforbund. Major Brit Knedal vitjar. (mint verður á at hava ein pakka við hvør).
Fríggjadag kl. 19,30 Ársfestin hjá samkomuni.
Leygardag kl. 20 Møti.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 9. februar kl. 19.30 møti fyri kvinnur í Evangeliihúsinum. Tórhild Bjarkhamar talar um lívskvalitet.
http://www.aglow.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Bjartur Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Christian Martin Christiansen.
Møti sunnukvøld verður tulkað til enskt.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing kórið venur.
Mikudagin 6. feb.: Kaffi í Vesturkirkjuni eftir føstugudstænastuna.
Leygardagin kl. 19 í KFUK: Varðmenn hittast til veitslu.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Nardus**
hevur evangeliskt møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 9.2. kl. 19.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Miðvágs missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikukvøldið kl. 19.30 LJÓS syngur. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.
Møti kl. 18 við Egin og Maritu Henriksen.

**Vágar - Kedron í Sørvági**
Fundarøð undir heitinum »Frelsa, friður og frælsi í Kristusi« verður í Kedron í Sørvági mikukvøldið 6. og hóskvøldið 7. februar kl. 20. Fundarøðin heldur fram í skúlanum í Miðvági fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17. Svenning av Lofti talar. Ymiskar sangkreftir verða við.

**Missiónshúsið Libanon**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 7/2-2008 kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Hósdagin 7/2 - Barnaarbeiði kl. 19.
Sunnudagin Morgunmøti við breyðbróting klokkan 11. Verið vælkomin.

**Evangelisk møtir í Bygdarhúsinum í Kollafirði 8.-10. februar**
Fríggjakvøldið kl. 21.00
Leygarkvøldið kl. 20.00
Sunnukvøldið kl. 18.00
Tú ert hjartaliga vælkomin!
*Stigtakari: Getsemane, Klaksvík.*

**Frá Kollafjarðar Missiónshúsið**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00 og møti kl. 18.00 har tey ungu skipa fyri.

**Felagið Agape**
skipar fyri spennandi vikuskifti í Nesvík 29. februar - 2. mars. Sí lýsing í blaðnum.

**Frá Kongshavnar Kvinnufelag**
Kristine S. Hestbech heldur almennan fyrilestur um »Det gode liv« mánakvøldið 11. feb. kl. 19.

**Haldórsvík**
Sang- og vitnimøti verður sunnukvøldið kl. 18 í Avhaldshúsinum. Luttøka verður úr Meinigheitshúsinum í Havn. Góðar sangkreftir luttaka.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl.18 Tim5.
Sunnudagin kl. 17 Møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Jan Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Hjørdis H. Petersen. Sangur við Sonlis og Tummas Símun.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikumorgun kl. 6 Bøn.
Mikudagin kl. 18.30 Bíbiltími v/Jonleif Danielsen.
Evni: Áps. 2,1-13.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow Eysturoy**
Møti verður í missións og Ungdómshúsinum á Glyvrum, leygarkvøldið 9. februar kl. 1930. Byrjað verður við drekkamunni, eisini verður lovsongur. Talarar: Marna Petersen og Ása Lútsen. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar:)

**Vælkomin til missiónsviku í Gøtu í døgunum 5.-10. februar 2008**
Møtini verða í kirkjukjallaranum.
Skrá fyri møtunum:
Mikukvøldið kl. 20 Føstuguðstænasta við Símun Jacobsen presti
Hóskvøldið kl. 20 Regin Høgnesen talar. Tabor kórið á Toftum syngur.
Innsavnan til Heimamissiónina
Fríggjakvøldið kl. 20 Knút Larsen talar. Manskórið úr Thabor í Fuglafirði syngur.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Jóannes I. Joensen talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eydnan á Oyrarbakka**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Hjalgrím Davidsen, Thomas J. Askham og Valdemar Simonsen. Magda og Majbritt syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøld kl. 20 hugnaløta fyri ung.
Hóskvøld kl. 20 ungdómsmøti
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Preben Hansen.

**KFUM & K, Klaksvík**
Mikudagin 6. feb. kl. 20 - bíbliutími.
Fríggjakvøld 8. feb. kl. 22 - Opið hús.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Høgna á Reynatrøð.
Leygarmorgun kl. 10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 18.00 er møti við André Matras. Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Betania, Skopun**
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti.
Leygardagin kl. 14 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 11 Møti við sjónvarpsupptøku.

**Missiónshúsið í Skopun**
Hósdagin kl. 20 bindimøti. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Hósdagin kl. 20 bindimøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Missiónsvikan heldur fram tórskvøldið kl. 20 møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara og Jógvan Højgård, trúboðara. Manskórið á Tvøroyri syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 møti við Regin Høgnesen, trúboðara og Dánjal Andreasen. Manskór úr Leirvík syngur. Innsavnan verður til húsið. Drekkamunnur verður aftaná.

**Frelsunarherurin í Vági**
Hósdagin kl. 20 Cafemøtini halda fram. Vitjan av hjúnunum Knedal úr Norra.
Øll eru vælkomin at vera við.

**Møtir í DK**
**Esbjerg:**
Friggakvøldið 8. feb. verður evangeliskt møti í Mølleparken, Spangsbjergsmøllevej 16 C, kl 19.30
**Sønderborg:**
Leygarkvøldið 9. feb.verður evangeliskt møti á Skolehjemmet, Søndrelandevej 28, kl 19.00.
Sunudagin kl. 10 verður breyðbróting.
**Vejle**
Sunnudagin 10. feb. kl. 16.00 verður breyðbróting og aftaná evangeliskt møti í hølinum hjá frelsens hær, Stadgårdsgade 4
Talarar og við á ferð verða Elsa og Pol Johan Djurhuus. Góður sangur og tónleikur. Aftaná øll møtini bjóða vit ein góðan drekkamun og okkur munngott afturvið. Vælkomin at hoyra orð Harrans á móðurmálinum.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**90 ár**
Sunnudagin 10. februar verður Fanny Johannessen, Sandavágur 90 ár. Dagurin verður hildin í meinigheitshúsinum í Sandavági frá kl. 17.

**80 ár**
Leygardagin 9. februar verður Tórhallur Andreassen 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum millum kl. 11 og 15. Øll eru vælkomin at heilsa uppá hann.

**60 ár**
15. februar verður Óli Emil Olsen, Vágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Framtíðini leygardagin 16. februar frá kl. 19. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við Óla Emil verða biðin um at siga frá áðrenn 8. februar á tlf. 266660.

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. mars kl. 14.00 giftast í Betesda, Anna Hvidbro og Johan Berg. Opið hús verður í Skálanum millum kl. 20.00 til umleið kl. 24.00. Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Hey vit skulu giftast!**



Leygardagin 15. mars kl.15 giftast, í sali Frelsunarhersins, Henrietta Joensen úr Tórshavn og Sámal Midjord úr Vági. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.
Tað hevði glett okkum um tú/tit, høvdu vilja hildið dagin saman við okkum. Ring á tlf. 319072 / 264854 (Sámal) ella 263816 (Henrietta) í seinasta lagi 23. februar.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 28/1 kundu hjúnini Lea og Óli Wolles í Søldarfirði halda silvurbrúdleyp. Tey, ið ynskja at gleða okkum við eini vitjan eru væl komin í høllina á Eiði leygardagin 9. februar millum kl. 15. og 21. Fyri at hava eina hóming av, hvussu mong eru væntandi, hevði verið gott at fingið boð í seinasta lagi mikudagin 6. februar á tlf. 44 20 31 ella teldupost oliwo@kallnet.fo

**Gullbrúdleyp**
Tann 15. februar hava Kristina og Hilmar Bech Porkeri gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Porkeri leygardagin 1. mars 2008 kl. 18:00, har øll eru vælkomin. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum hendan dagin, kunnu siga frá á tel. 373185 – 374075 ella á e-post jomo@post.olivant.fo áðrenn 17. februar 2008.